# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Johan Eli Lisberg 70 ár



Leygardagin 2. desember fylti Johan Eli Lisberg í Hvalba 70 ár.

Foreldrini vóru Olantina F. Skaalum, Vestantún í Hvalba, og Danjal Johan Lisberg, úr Smiðjuni í Fámjin. Tey fingu tveir synir, Johan Eli og Trygva (ið var 3 ár yngri). Sum einans 11 og 8 ára gamlir mistu teir pápan, mamman gjørdist 92 ára gomul.

Johan Eli giftist í 1963 við Margit f. Midjord, frá Neyst í Hvalba, dóttur Kristionnu og Jákup Midjord, vanliga nevndur (Jákup hjá Nielsi). Margit og Johan Eli eiga 5 børn, 4 synir og eina dóttur. Tveir av synunum búgva her suðuri, Dánjal Jóhan sum býr á Tvøroyri, og Jákup, sum býr á Økrum, Eyðun, sum býr í Kvívík og Óli sum býr í Hoyvík, Kristianna, ið er yngst, býr í Havn.

Beiggin, Trygvi, var sjómaður alt lívið, til hann einans sum 45 ára gamal gekk burtur á sjónum, frá konu og tveimum børnum.

Eitt kann sigast um Johan Eli, at sera arbeiðssamur hevur hann verið øll árini. Sum faðirleysur, og elstur av beiggjunum, hevur hann lært at taka ábyrgd av øllum, sum gerast skuldi í heiminum. Og tað var ikki smáting, tí tey høvdu bæði seyð, neyt og handil.

Sum ungur var hann bæði á háskúla í Havn og í Danmark. Har fekk hann vinir og hevur samband við fleiri av teimum enn. Eisini var hann eitt skifti til skips, men eftir at vera giftur og familjan so smátt var farin at vaksa, var hann heima aftur, fyri at passa familjuna, handilin og jørðina og tað sum annars var at taka sær av t.d. rógva út við 10 mannafarinum, sum hann átti saman við øðrum. Men sum hjá so nógvum var hugurin stórur at sleppa aftur til skips og ein fyrispurningur um at loysa av ein túr við skitfiskabátinum Gudmundi, gjørdist til 35 ár á sjónum. Hetta tíðarskeiðið sigldi hann við Gudmundi, línubátinum Niels Paula, trolarunum Niels Paula og Phønix, sum hann var síðsta túrin við fyri hálvumøðrum ári síðani. Ein stóran part av tíðini til skips hevur hann verið kokkur, og hóast onga útbúgving á økinum hevur ligið væl fyri.

Mangan góðan fiskabitan hava vit fingið frá tær og hóast vit ofta sakna frikadellurnar og ræsta fiskin, so kanst tú við góðari samvitsku sita í lenistólinum og hyggja at sjónvarpi ella fáa tær ein blund. Tú hevur so sanniliga gjørt tína skyldu sum pápi, ja so nógv meira enn tað, altíð klárur at hjálpa bæði einum og øðrum.

Johan Eli kennir nógv fólk, kanska einamest frá skipstíðini, og ósmæðin sum hann er, tá tað kemur til at koma í prát við fólk, hevur hann m.a. fleiri vinfólk í Hanstholm, sum var ein føst landingarhavn gjøgnum fleiri ár.

Væl dámar honum, tá hann hevur alla familjuna rundan um seg, bæði børnini við makum og abbabørnini, tað er ikki lukkuligt, sum hann tá spyr um bæði líkt og ólíkt. Tað er eisini sera hugnaligt, tá hann fortelur onkra søguna frá fyrr, og úr Hvalba eru nógvar góðar søgur. Har hevur, er og hevur altíð verið nógv fólk, sum hava duga væl at spæla øðrum »eitt puss« og hava eitt sermerkt lyndi.

Vit kundu skriva fleiri síður afturat, men velja at steðga her, og fara at enda at ynskja tær hjartaliga tillukku á 70 ára degnum og alt tað besta í framtíðini, mamma fær eisini eina heilsu, uttan hana hevði onki verið sum tað er.

Gud signi tykkum bæði.

Heilsan frá okkum øllum.

**Børnini, við makum og abba/ommubørnini**

## Andlát og jarðarferðir

**Finnur Fríði Poulsen,** ættaður úr Vestmanna, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 1. desember, 62 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mánadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. ættaður úr Vestmanna, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 1. desember, 62 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mánadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri vinur

**Finnur Fríði Poulsen**

ættaður úr Vestmanna búsitandi í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 1. desember 62 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mánakøldið kl. 18.00

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.00

Sungið verður úr sálmabókini.

**Sambýlið Grønlandsvegur 59**

Tórshavnar kommuna:

# Edvard í Skorini Joensen settur sum kunningarleiðari



Edvard í Skorini Joensen, sum hevur verið leiðari á Kunningarstovuni í Vágum, tekur á nýggjárinum við sum kunningarleiðari hjá Tórshavnar kommunu.

Sum leiðari á Kunningardeildini hjá býráðnum fær hann ábyrgdina av samskiftinum millum starvsfólk, deildirnar hjá kommununi og millum kommununa og borgararnar. Harumframt fær hann ábyrgdina av at røkja heimasíðuna hjá kommununi.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at stórur tørvur er á einum kunningarleiðara til kommununa, serliga nú kommunan er vorðin so stór.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum hjálp og samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Jóhanna Davidsen**

Sørvágur

andaðist og varð jarðað.

Vit takka teimum, sum sendu blómur og kransar og teimum mongu, sum sendu gávur til Skandinavisku Barnamissiónina.

Ein innilig tøkk til Ellisheimið í Vágum, Umlættingarheimið í Syðrugøtu og Missiónshúsið í Sørvági fyri tykkara hjálp og stuðul.

Vit takka sangarum, kirkjutænarum og øllum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Børnini við familjum**

## Dagurin

**5. desember. Sabina.** Nógvar halgikvinnur bera hetta navn, men eingin tykist at hava samband við henda dag. Hildið verður tí, at talan er um tann halga mannin Sankta Sabas, ið er kendur kleysturbyggjari í Palestina. Hann doyði umleið ár 532.

## Hanna Thomsen 40 ára starvsdag

1. desember 2006 hevði Hanna Thomsen í Vági verið reingeringsfólk í Suðuroyar Sparikassa í 40 ár.